Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Tórshavn, 1. juli 2025
Journal nr.: 25/15409

Svar frá Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu, upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-113/2024 frá Karlot Hergeirssyni, løgtingsmanni, um flutning av djórum millum lond

Fyrispurningur

1. Hví er tað ikki møguligt hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (HFS) at móttaka og avgreiða innflutningsloyvi fríggjadagar?
2. Er tað møguligt, at HFS kann útveita avgreiðsluna av innflutningsloyvinum til privatar djóralæknar?

Svar

Svarað verður undir einum.

Fyri at verja djór í Føroyum ímóti sníkum og djórasjúkum er bara loyvt at innflyta hundar og kettur við galdandi heilsuváttan til Føroya. Sama er galdandi fyri hundar og kettur, sum ferðast uttanlands og koma aftur til Føroya.

Djóralæknakanningar av hundum ella kettum, sum skulu hava innflutningsloyvi ella ferðaloyvi, skulu ikki vera eldri enn tveir dagar, tá ferðin úr sendaralandinum byrjar, sbrt. § 20, stk. 1 og § 30, stk. 1 í *kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni.*

Orsøkin til hesa freist er, at trygd skal kunna veitast fyri, at heilsuváttanin er rætt, sbr. § 29, stk. 2, ella § 41, stk. 2, í omanfyrinevndu kunngerð, og at stundir eru at fáa viðurskiftini í rættlag, um krøvini í heilsuváttanini ikki eru lokin.

Avgreiðslan av umsóknum til innflutningsloyvi og eftirkanningin av heilsuváttanunum er tíðarkrevjandi, og tað ber tí ikki til at taka ímóti og avgreiða umsóknir um innflutningsloyvi sama dag. Av hesi orsøk ber ikki til at ferðast sunnudag.

Tað er ein myndugleikauppgáva at hava veterinert marknaðeftirlit. Skal hetta broytast, má hetta gerast í regluverkinum. Í løtuni verður ikki arbeitt við hesum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 1. juli 2025

Sirið Stenberg

Landsstýriskvinna